# Kjak



**Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur**
*býráðslimur í Klaksvík*

# Hvat kom í staðin?

*Serkunnleikin varpar oftani ljós á, at tað ger onki og at tað er í lagi, at talið av arbeiðsplássum í fiskivinnuni minkar.*

Og hetta er helst eisini rætt. Vit klaksvíkingar hava fyri langari tíð síðani merkt hetta á okkara egna kroppi. Her vóru vit enn einaferð uppi í teimum allarfyrstu sum merktu hetta, og var hetta langt áðrenn serkunnleikin kom til hesa niðurstøðu.

Hetta hendi alt ímóti okkara vilja, men tíðir broytast og ein skal royna at laga seg sum frægast til framtíðina. So er spurningurin, hvat fingu vit ístaðin fyri hesi mistu arbeiðsplássini, og hvat hevur framtíðin at bjóða okkum.

Bara fyri at fara nøkur ár aftur, so kunnu vit spyrja okkum, hvar eru arbeiðsplássini farin, sum vóru umborð á skipum sum Hans Erik, Sigurfarið, Borðoyarnes, Nónhamar, Stella Karina, Stella Kristina, Karina, Palli hjá Marianna, Klettur, Julius á Bakka, Norðingur, Borgarin, Horizont fyri bara at nevna nakrar úr rúgvuni.

Fyri tað fyrsta vóru nógv arbeiðspláss umborð á hesum skipum og haraftrat góvu hesi skip sera nógv avleitt virksemi á landi.

Tað var privat fyritaksemi, sum megnaði at fáa samfelagið at koyra so væl her norðuri. Hetta hevur gjørt sítt til, at tørvir eru skapaðir. Her hugsi eg serliga um sjómansskúla, vinnuháskúla, fiskuvinnuskúla, havrannsóknarskip, fiskiveiðueftirlitið, vaktar og -bjargingartænastuna, heilsufrøðisligu starvsstovuna, og ikki at gloyma fiskimálaráðið.

Tað er heilt einastandandi, at vit føroyingar hava megnað at stovnsett allar hesar skúlar og stovnar. Men hvar eru so hesir skúlar og stovnar heilt erligt???

**Løgið, at vit innan maritimu útbúgvingarnar bert hava ein lítlan sjómansskúla í Klaksvík**

Tað løgnasta av øllum er tó, at okkara landspolitikarar í øllum hesum ikki vakna og rópa varskó og síggja veruleikan í eyguni. Duga teir veruliga ikki at síggja, at nógv av hesum almennu arbeiðsplássunum náturliga hoyra heima í Klaksvík?

Eg spyrji einaferð enn, hvat ætla landsins myndugleikar við hesum landi? hvat ætla tit við býum og bygdum úti um landið? Tað er tykkara ábyrgd at melda út, soleiðis, at fólkið úti um landið fær eina erliga og klára útmelding frá tykkum sum skjótast.

Um ein er heilt erligur, so er tað serdeilis løgið, at vit innan fyri tær maritimu útbúgvingarnar bert hava ein lítlan sjómansskúla í Klaksvík. Her er ikki møguligt at taka skipsføraraprógv. Sjálvt henda lítla skúlan verður nú roynt at flyta til Havnar.

Fyri okkum í norðurøkinum føli eg tað sera undarligt, at vit skulu vera so hart rakt hvørja einastu ferð niðurtúrur er fyri fiskivinnuna. Aðrastaðni merkja tey hvørki eitt ella annað til niðurtúrarnar.

Nú skal ongin misskilja meg. Boðskapurin er, at tað er gott, at fólkið í høvuðsstaðnum stórt sæð onki merkir til niðurtúrar í fiskivinnuni, og her skulu vit fegnast við teimum.

Men boðskapurin er, hví tað ikki er meira javnt fordeilt, meir javnt millum føroyingar Føroyar. Vit eiga eisini hesi almennu arbeiðsplássini, tí vit hava verið við til at skapa tey. Tað kann ikki vera rætt og rímiligt, at vit her norðuri skulu gjalda ein slíkan stóran prís fyri at arbeiða í primervinnuni.

Enn eigur býurin gott og slóðbrótandi fólk, sum ikki eru bangin fyri at arbeiða og ganga nýggjar leiðir. Vit skylda teimum stóra tøkk og bestu umstøður at virka undir.

At íbúgvaratalið í Klaksvík er minkað so lítið, sum tað hevur víst seg tey seinnu árini, er ikki annað enn eitt stórt undur. Við teim stóru broytingum og mistu arbeiðsplássum í okkaru høvuðsvinnu seinnu árini, vildi fólkatalið í flest øðrum býum náturliga havt eina alstóra minking.

Vit her í Klaksvík hava sum omanfyrinevnt mist hundraðtals av arbeiðsplássum í fiskivinnuni. Sannleikin er at hesi arbeiðspláss í primervinnuni eru mist úr býnum, samstundis sum almenn arbeiðspláss eru sett á stovn í høvuðsstaðnum. Hugaligt hevði verið, um serkunnleikin nú traðkaði til og segði um hetta var í lagi.



**Dávid Isfeld**
*Hósvík*

# Hví, Helena Dam á Neystabø?

Tað er sum um Helena Dam á Neystabø hevur eina dulda dagsskrá, tá hon, við støði í donskum undirvísingarleisti og reglum, framvegis arbeiðir beint fram ímóti at fáa enn meira danskt inn í miðnámsskúlarnar. Næmingar hava úttala seg um hetta, og fleiri hava sagt seg ikki vilja hava meira danskt, tí teir ikki hava tørv á donskum, til tað, sum teir hava ætlanir um. So hví, Helena, hví skulu miðnámsskúlanæmingar tyngjast óneyðugt við meira donskum?

Danskt á A-stigi er ein sera lesitung og krevjandi lærugrein. Og ikki koma við tí frágreiðing, vit longu hava hoyrt, tí hon sigur bert hvat danir krevja av dønum...og forrestin eisini føroyingum (og grønlendingum?). Hesum danska undirvísingarreformi aktar tú sum ein lýðin smágenta. Hetta tykist mær bæði undrunarvert og óbúgvi av eini landsstýriskvinnu í hesum landi. Hví ikki krevja somu rættindi og sømdir sum okkara grannalond, ið gevur okkum atgongd til hægri lærustovnar uttan at skula hava danskt á A-stigi? Ein slík avtala er longu galdandi millum Norðurlond.

## Ger danskt til vallærugrein

Vit vita øll, at eitt fjøltátta samfelag er tað besta; fjøltátta á øllum økjum: fjøltátta í fólkasløgum, í list og mentan, í vitan, í vinnu (fleiri bein at styðja seg til) o.s.fr. Vit liva í einum vitanarsamfelag, har júst vitan eigur at vera ovast í raðfestingunum. Lat okkum so fáa so ymiska og breiða vitan sum til ber. Tað fáa vit ikki við núverandi leistinum hjá Helenu og Mentamálaráðnum. Við hetta lag er bert talan um dansk-vitanarsamfelag.

Í ándini og í samsvar við hugsjónina um eitt "vitanarsamfelag" vil eg heita á Helenu Dam á Neystabø, um at arbeiða fram ímóti, at danskt verður ein vallærugrein í miðnámsskúlunum, síðustilla við franskt, spanskt, russiskt o.s.fr. Og ikki bert A-stig, men danskt sum heild, tí hetta mál er fulkomiliga óneyðugt fyri tey, ið ikki ætla sær at lesa víðari í Danmark – tað snýr seg hóast alt um tørvin og trivnaðin hjá næmingunum, ikki so Helena?

## Hvør er visjónin, Helena?

Vit hava higartil bert hoyrt grundgevingarnar hjá Helenu Dam á Neystabø fyri at akta boðum úr Danmark, men einki hoyrt um, hvat er gott fyri okkum framyvir, hvussu hetta ávirkar næmingarnar, og Føroyar, í síðsta enda. Her er eingin visjón, eingin tanki lýstur. Er tað so galið, at hetta er miðvís donsk indoktrinering av føroyingum? Tí tá ein lesur danskt, lesur ein bert um Danmark, danir og donsk viðurskifti. Mær dámar ikki "samansvørjingarástøði" sum heild, men árinini av hesi yvirflóð av donskum í miðnámsskúlunum, fer at hava við sær, at lærdi føroyingurin fer at vita ríkiligt um Danmark, og stórt sæð einki um altjóða mentan, søgu og vinnu. Hetta fer at gera okkum sera veik í altjóða viðurskiftum. Danir eru nóg sterkir í viðvíkjandi altjóða vitan og viðurskifti, tí teir nýta sítt undirvísingartilfeingi til donsk og altjóða viðurskifti. Vit, harafturímóti, nýta meginpartin av okkara tilfeingi til føroysk og donsk viðurskifti, soleiðis, at sera lítið er eftir til altjóða vitan og viðurskifti.

Vit hava havt mangar ágóðar av at lesa í Danmark – undirritaði íroknaður – men vit gerast eisini avmarkaði og tískil minni dugnalig, tá vit bert hyggja, lesa og ferðast í ein landsyning. Hvør er visjónin, Helena? Hvat vilt tú? Tú ert ikki danskt lærari nú. Tú ert landsstýriskvinna í mentamálum, og ikki bert danskur administratorur í Føroyum. Hetta snýr seg ikki um hvat tú og eg meina; men um val- og lesimøguleikar og sjálvsavgerð hjá næmingunum.